**Ófráboðaðir spurningar til løgmann og landsstýrisfólk**

**Ungdómstingið týsdagin 11. februar kl. 13.30**

**Spurningur nr. 1**

**Spyrjari: Heini Edvardsson**
**Til: Kaj Leo Holm Johannesen, løgmann**

Í almenna kjakinum hevur nógv prát verið um tunlar; meðan øki í tí, vit vanliga kalla kjarnuvælferð, eru heilt burtur úr politiska landslagnum, og tí er okkum natúrligt at spyrja:

Spurningurin er: Hví raðfestir samgongan tunlar fram um vælferðarøki sum t.d. ellisheim og eldrarøkt?

**Spurningur nr. 2**

**Spyrjari: Tóki Wiberg Justinussen**
**Til: Karsten Hansen, landsstýrismann**

Vit hava varhugan av, at tað er tilvildin sum ræður, hvat fíggjarligt endurgjald verður latið, tá man ferðast til Danmarkar sum fylgjari hjá sjúkum barni.

Spurningurin er: Hvussu eru reglurnar á økinum?

**Spurningur nr. 3**

**Spyrjari: Ronja Weihe**
**Til: Jørgen Niclasen, landsstýrismann**

Aloftast er fíggjarliga rásarúmið hjá ungum ikki stórt. Og tískil órógva stór sveiggj í inntøkugrundarlagnum og eftirfylgjandi skatti.

Spurningurin er: Hevði borið til at spjatt skattaútjavnan til alt árið – heldur enn til seinast á árinum?

**Spurningur nr. 4**

**Spyrjari: Boas H. Heinesen**
**Til: Bjørn Kalsø, landsstýrismann**

Ein eyðsýndur táttur í menningini av føroyska samfelagnum er at fáa fleiri hægri útbúgvingar settar á stovn á til dømis Fróðskaparsetri Føroya.

Spurningurin er: Hvussu líður arbeiðinum at fáa meir fjøltáttað útboð av útbúgvingum í Føroyum?

**Spurningur nr. 5**

**Spyrjari: Linda Fosaa**
**Til: Johan Dahl, landsstýrismann**

Syndarligar ferðsluvanlukkur hava sett dagsskránna seinastu tíðina, og null-loysnin hjá

Ráðnum fyri Ferðslutrygd og landsstýrinum kámast. Afturat tí er tað ein sannroynd, at ungir menn sum oftast eru bilførarar, tá vanlukkur henda.

Spurningurin er: Ber til at gera mun á ella differentiera í lóggávu, soleiðis at menn fáa ikki koyrikort fyrr enn á 20 ára aldri?

**Spurningur nr. 6**

**Spyrjari: Britt Hovgaard**
**Til: Anniku Olsen, landsstýriskvinnu**

Í næstum verður eitt fátækramark ásett í Føroyum, ið er ein ásett upphædd fyri, hvat tú í minsta lagi kanst liva fyri í Føroyum fyri at fáa gerandisdagin at hanga saman.
Hvørji jól eru tað fleiri enn hundrað borgarar, sum søkja um jólahjálp. Hetta er eitt tekin um, at tað eru nógv í Føroyum, sum hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman.

Spurningurin er: Hví er tað týdningarmikið, at Føroyar fáa eitt fátækaramark, og hvat fer landsstýriskvinnan at gera fyri teir borgarar, ið liva undir hesum marki? Hvussu fara hesir borgarar heilt ítøkiliga at merkja, at eitt fátækramark er sett? Nú er arbeiðið ikki endaliga liðugt, men hevur landsstýriskvinnan nakra hóming um, hvussu nógvir føroyringar eru undir fátækaramarkinum?

**Spurningur nr. 7**

**Spyrjari: Teitur J. Sigvardsen**
**Til: Karsten Hansen, landsstýrismann**

Samferðslukervið verður støðugt útbygt, og er nú koyrandi millum stórar partar av Føroyum. Undirsjóvartunlar knýta oyggjar saman.

Spurningurin er: Hevði ikki verið meir rationelt við tveimum sjúkrahúsum í Føroyum, og sostatt niðurlagt Klaksvíkar sjúkrahús?

**Spurningur nr. 8**

**Spyrjari: Magnus Heinason Eysturoy**

**Til: Bjørn Kalsø, landsstýrismann**

Seinastu árini er teldan komin meir og meir inn í fólkaskúlan, serliga sæst tað væl á royndunum og próvtøkunum, men í verandi støðu er tað sera stórur ójavni á telduøkinum hjá ymsu skúlunum. Summir skúlar hava góðar teldur og teldlar og aðrir sera vánligar teldur og ongar teldlar. Til dømis hevur Komunuskúlin givið teimum ungu næmigunum teldlar, ímeðan Venjingarskúlin als ikki hevur nøktandi teldur.

Vit vilja hava, at næmingar í øllum samfelganum fáa nøktandi teldur, ið skulu brúkast til royndir, próvtøkur o.s.v. Tí so verður eitt javnari samfelag, tað fer eisini at lætta um hjá lærarum, næmingum og ikki minst næmingum, ið eru fíggjarliga sperdir.

Vit meta tað, at lærarar ikki hava teir røttu førleikarnar, til teldur og IT, og tí vilja vit styrkja teirra førleika.

Teldan er framtíðar amboð, og næmingarnir eru framtíðin í samfelagnum. Tí vilja vit hava, at næmingarnir eru kønir innan fyri teldur, tí so verður samfelagið framkomnari, tá ið teldur verða enn meir umráðandi enn nú.

Spurningurin er:

1. Hevur landsstýrismaðurin í mentamálum nakrar ætlanir fyri, hvussu teldur skulu brúkast í fólkaskúlanum í framtíðini?
2. Er tað nøktandi, at næmingar ikki hava somu karmar, tá ið tað kemur til teldur, tá ið royndir og próvtøkur oftast eru á teldum?
3. Ætlar landsstýrismaðurin í mentamálum at áleggja kommununum, at næmingar fáa atgongd til nøktandi teldur?
4. Ætlar landsstýrismaðurin í mentamálum at styrkja førleikarnar hjá lærarum viðvíkjandi teldum?
5. Hevur landsstýrismaður í mentamálum ætlanir um at fáa telduundirvísing í námsætlanina?

**Spurningur nr. 9**

**Spyrjari: Tóki Wiberg Justinussen**
**Til: Johan Dahl, landsstýrismann**

Í Suðuroynni eru vit bundin av ferðing við ferju til meginøkið, og eru vit um at verða frá okkum sjálvum orsakað av broytingum og avlýsingum í ferðaætlanini; fyrst hjá Smyrli og nú hjá Norrønu.

Spurningurin er: Er tað í lagi, at SSL broytir ferðaætlan hjá Smyrli/Norrønu í tíð og ótíð?

**Spurningur nr. 10**

**Spyrjari: Leyvoy í Gerðinum**
**Til: Kaj Leo Holm Johannesen, løgmann**

Ræðuligasta brotsgerðin, sum vit kunnu ímynda okkum, er kynsligur ágangur ímóti børnum, og vit halda, tað er løgið, at revsingin av slíkum brotsgerðum als ikki er í samsvari við avleiðingarnar av slíkum brotsgerðum.

Spurningurin er: Hví er revsingin ikki harðari fyri kynsligan ágang ímóti børnum?

**Spurningur nr. 11**

**Spyrjari: Tóki Wiberg Justinussen**
**Til Jacob Vestergaard, landsstýrismann**

Tað er sera trupult at sleppa av við tómar fløskur og dósir í Føroyum. Ofta skal ein 4-5 ymisk støð, og tað er slettis ikki altíð, at man sleppur av við allar fløskurnar allíkavæl.

Spurningurin er: Hví kann man ikki avreiða øll sløg av fløskum og dósum á einum stað?

**Spurningur nr. 12**

**Spyrjari: Teitur J. Sigvardsen**
**Til: Johan Dahl, landsstýrismann**

Felagslív og felagsskapir skipa javnan fyri serligum tiltøkum til tess at útvega pening til arbeiði teirra ella fremja virki teirra á annan hátt. Á hesum tiltøkum er skeinkiloyvi ein alt meir natúrligur táttur. Hinumegin stendur halgidagslógin; og kenna felagsskapir seg gera seg inn á halgidagslógina.

Spurningurin er: Ber til at gera smidligari skipan viðvíkjandi undantøkum frá halgidagslógini, tá serlig tiltøk eru?

**Spurningur nr. 13**

**Spyrjari: Gudmundur Mortensen**
**Til: Karsten Hansen. landsstýrismann**

Misnýtsla av rúsdrekka hevur við sær álvarsligar sjúkur og aðrar trupulleikar, men tað er loyvt at drekka seg fullan, tá man hevur hug til tess. Øll kunnu roykja so nógvar sigarettir, sum ein hevur hug til, hóast vandan fyri krabbameini og øðrum sjúkum. At roykja hash er eisini vandamikið, umframt at tað er bannað.

Spurningurin er: Hví er tað loyvt at drekka rúsdrekka, roykja sigarettir, men bannað at roykja hash?

**Spurningur nr. 14**

**Spyrjari: Johan Hofgaard**
**Til: Johan Dahl, landsstýrismann**

Úr øðrum londum kenna vit skipanina viðvíkjandi koyrikorti til ung; har 17 ára gomul fáa koyrikort, men hava einans loyvi at koyra, tá annar vaksin við koyrikorti situr í bilinum saman við teimum. Og hetta er galdandi fyrsta árið, tey ungu hava koyrikortið.

Spurningurin er: Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta líknandi skipan í verk í Føroyum, so 17 ára gomul fáa koyrikort til bil?

**Spurningur nr. 15**

**Spyrjari: Britt Hovgaard**
**Til: Jørgen Niclasen, landsstýrismann**

Brýr og tunlar binda saman størsta partin av okkara oyggjum –

Spurningurin er: Man fast samband nakrantíð koma til Suðuroynna?

**Spurningur nr. 16**

**Spyrjari: Laila Neshamar**
**Til: Anniku Olsen, landsstýriskvinnu**

Eitt Fountain-hús er eitt stað, sum hjálpir fólkum, sum hava verið innløgd fyri eina sálarliga sjúku, út aftur á arbeiðsmarknaðin. Hetta er eitt arbeiðsrættað tilboð, ið skal fyribyrgja nýggjar innleggingar.
Fleiri tónleikatiltøk, bæði í Føroyum og í Keypmannahavn, hava verið, har m.a. danski bólkurin Nephew spældi á Norðurbryggjuni fyri at samla pening saman til at stovna hetta tilboðið til sálarsjúk.
Landsstýriskvinnan hevur síðani sett 2 milliónir av í heyst.

Spurningurin er: Hvussu skjótt verður hetta tilboðið klárt? Hevur landsstýriskvinnan funnið hóskandi høli? Kann landsstýriskvinnan í stuttum greiða Ungdómstinginum frá, hvat hetta nýggja tilboðið fer at fevna um?

**Spurningur nr. 17**

**Spyrjari: Tabita av Rana Nitschke**
**Til: Johan Dahl, landsstýrismann**

Ung hava tørv á lummapeningi til egna nýtslu, og tey flestu vilja fegin forvinna peningin sjálvi. Tá man forvinnir egnan pening, so hugsar man eisini meira um, hvussu peningurin verður nýttur.

Spurningurin er: Hví 14 ára gomul ikki kunnu hava eitt frítíðarstarv?

**Spurningur nr. 18**

**Spyrjari: Tabita av Rana Nitschke**
**Til: Bjørn Kalsø, landsstýrismann**

Vit halda, tað er týdningarmikið við einum øðrvísi skúlatilboði til næmingar í framhaldsdeildini, og halda, at ein eftirskúli er ein góður møguleiki.

Spurningurin er: Hvussu gongur við ætlanunum um ein eftirskúla í Suðuroynni?

**Spurningur nr. 19**

**Spyrjari: Bárður Dimon**
**Til: Johan Dahl, landsstýrismann**

Vit halda tað er týdningarmikið at miða eftir grønari orku allastaðni í Føroyum til gagns fyri náttúruna, umhvørvið og búskapin.

Spurningurin er: Hví íløgur ikki verða gjørdar í vindorku í Suðuroynni?

**Spurningur nr. 20**

**Spyrjari: Brandur Solmunde Gaard**
**Til. Jørgen Niclasen. landsstýrismann**

Tað er kostnaðarmikið at keypa vørur á netinum úr útlondum, tí tað eru bæði tollur og avgjøld, sum skulu gjaldast aftrat, áðrenn man kann fáa vøruna, sum man hevur bílagt og goldið fyri.

Spurningurin er: Hví eru avgjøldini so høg?

**Spurningur nr. 21**

**Spyrjari: Miriam við Reiðlið Nielsen**
**Til: Karsten Hansen, landsstýrismann**

Spurningurin er: Vit undra okkum yvir, hví tað seinasta heyst yvirhøvur varð ein spurningur, at føðideildin á Suðuroyðar Sjúkrahúsi møguliga skuldi niðurleggjast?

**Spurningur nr. 22**

**Spyrjari: Ronja Weihe**
**Til Jacob Vestergaard, landsstýrismann**
Man hoyrir so ofta í fjølmiðlunum, at tað er stríð um býtið av makrelfiskiskapinum. Hetta hava vit hoyrt nú í fleiri ár.

Spurningurin er: Hví er tað so ringt at finna eina semju um makrelin?

**Spurningur nr. 23**

**Spyrjari: Teitur J. Sigvardsen**
**Til: Johan Dahl, landsstýrismann**

Lýsingarherferðin "Keyp føroyskt" ger innrás í føroysku húsarhaldini. Endamálið er sjálvsagt at stuðla føroyskum vinnulívi.

Spurningurin er: Hví ber ikki til hjá føroyingum at bryggja sterkan løg í Føroyum til føroyska marknaðin?

**Spurningur nr. 24**

**Spyrjari: Britt Hovgaard**
**Til: Jørgen Niclasen, landsstýrismann**

Ferð eftir ferð hava vit til løgtingsval hoyrt valevni úr øllum flokkum siga: Vel meg, so fáa tit ein nýggjan tunnil til Hvalbiar! Enn er eingin nýggjur tunnil ávegis.

Spurningurin er: Hvussu gongur við ætlanunum um ein nýggjan tunnil til Hvalbiar?